**FISKIVINNUTÍÐINDI**

# Gongur trekt við svartkjaftasamráðingunum

SVARTKJAFTUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Allan mikudagin og hósdagin sótu embætismenn frá teimum londunum, sum veiða svartkjaft á fundi fyri at finna ein nýggjan býtislykli, sum skal steðga ótálmaðu veiðuni eftir svartkjafti.

Talan eru um Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg, Russland og ES londini. Talan er um eina stóra samráðingarnenvd. Heili 35 verilsir eru bíløgd á Hotel Føroyum, har fundurin verður hildin

Tað var lítið at frætta frá fundinum á middegi í gjar áðrenn blaðið fór til prentingar, men Sosialurin skilir, at samráðingarnar eru trekar og partarnir standa enn langt frá hvørjum øðrum.

Heldur ikki fiskimálaráðharrin Jøgern Niclasen visti nakað, men hann sigur, at kemur onki burturúr á hesum fundinum, so kann henda, at kallað verður saman til nýggjan fund, har politikkararnir koma saman.

Av tí at ongin semja er enn funnin um, hvussu svartkjafturin skal býtast millum londini, er veiðan endað upp á 1.4 milliónir tons fyri í fjør Hetta er tvífalt so nógv sum stovnurin tolir.

Føroyska samráðingarnevndin telir sjey fólk og leiðari er Andrass Kristiansen, fiskifrøðingur, sum starvast í Fiskimálastýrinum.

Tvídrátturin er serliga millum ES og Noregi. ES slett ikki ganga við til, at Noreg fær so stóran part av samlaðu kvotuni, sum norðmenn ynskja. Norðmenn eru av eini heilt aðrari støðu.


*Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri*


*Otto Gregussen, norskur fiskimálaráðharri*

## ES órímuligt

Norski fiskimálaráðharrin, Otto Gregussen, segði, tá hann var í Føroyum herfyri, at norðmenn áttu søguligan rætt til svartkjaftin.

– Eg haldi at uppskotið hjá ES til ein býtislykil, har Noreg bert fær 12 prosent av kvotuni er heilt órímiligur. Vit hava verið við til at fiska svartkjaftin frá byrjan og vit kunnu slett ikki góðtaka uppskotið frá ES, sigur Otto Gregussen.

– Eg skilji heldur ikki tilmælini frá ICES um svartkjaftastovnin sum eina null loysn. ICES sigur greitt at bann eigur at vera sett fyri allari svartkjafta veiðu til ein semja er fingin millum londini um býtislykilin, og tað merkir ikki tað sama sum at øll svartkjaftaveiða steðgar í komandi ári, sigur Otto Gregussen.

## Allir mugu slaka

Føroyski fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen íð hevur verið stigtakari til svartkjaftafundin, segði herfyri.

– Skulu londini hava tað tey ynskja, so gevur hetta í vanligari prosentrokning langt omanfyri 100 prosent. Allir mugu slaka, tí vit mugu niður á 100 prosent.

Føroyska kravið til svartkjaftakvotu er rættuliga stórt. Skuldi samlaða kvotan komið niður á 700.000 tons, so er føroyska kravið eitt sindur omanfyri 200.000 tons av hesum.

ICES hevur mælt til, at bann verður sett fyri at veiða svartkjaft, til ein semja um býti er fingin í lag millum londini.

# Fiskifrøðingar kunnu geva føroyingum størri kvotu

KONGAFISKUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Fiskifrøðingar úr Føroyum, Íslandi og Noregi arbeiða við eini verkætlan, har teir royna at prógva upprunan til kongafiskin í Irmingarhavinum.

Talan er um tvey sløg av kongafiski. Annað slagið livir longur uppi í sjónum, og er minni kongafiskur. Hesin er helst tann sami, sum livir í grønlendskum sjógvi. Men fiskurin, sum livir á djúpari vatni verður hildin at vera sami stovnur, sum er í føroyskum og íslendskum sjógvi, men tað er ikki prógvað enn.

– Eitt er so staðfest, kongafiskaveiðan undir Føroyum minkaði úr 15.000 tonsum og niður í 7000 tons so skjótt, sum av álvara varð farið at fiska kongafisk í Irmingarhavinum. Tað kundi so bent á, at talan var um sama stovn, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

– Verður tað staðfest, at djúpvatnskongafiskurin í Irmingarhavinum er av sama stovni sum okkara, so er støðan ein heilt onnur hjá føroyingum, enn hon er í dag. So eru vit knappliga eitt strandaland og tá er tað knappliga ein partur av okkara kongafiski, sum verður fiskaður í Irmingarhavinum. Og hetta skal merkja, at vit fáa eina munandi størri kvotu enn vit eiga í dag, sigur Jørgen Niclasen.

Kongafiskurin í Irmingarhavinum varð kvoteraður fyri einum fimm árum síðan. Føroyingar eiga kvotu saman við Grønlandi. Hendan kvotan er 20.000 tons og av henni eiga føroyingar í ár 3300 tons.


*Ljósafelli, ein av kongafiskatrolarunum*




## Oljuskattadeildin helst í Klaksvík

OLJUPENGAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri boðaði herfyri frá tí tinginum, at tann parturin av Toll og Skatt, sum skal taka sær av skatting av eini komandi oljuvinnu, kemur ikki at liggja í Havn.

Síðan hava seiglívaði tíðindi gingið um, hendan deildin fer at liggja í Klaksvík og at bróðurparturin av peninginum sum fer at streyma til landið, verður olja funnin, skal inn um Klakk at venda, áðrenn hon fer út aftur í samfelagið.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri vil hvørki vátta ella avsannað tíðindini.

– Tað einasta eg vil siga er, at enn er ikki tikin endalig avgerð um hetta, men at hendan avgerð verður tikin skjótt, sigur Karstin Hansen.

# Tríggjar grindir í eina viku

Í allari tokuni í gjárkvøldið lógu bátar hjá eini grind, sum var funnin í Nólsoyarfirði. Tað var kjaftsvart í mjørka í løtum og kortini eydnaðist at halda grindini til stutt fyri midnáttarleitið. Grindin taldi 57 hval og varð býtt millum tey, ið vóru í drápinum.

Hetta er triðja grindin innan stutta tíð í Føroyum. Fyrsta varð hildin til í Vestmanna, síðan var ein hildin til á Sandi og nú í Havn.

**je**

